# LÆRARASTARV Í SERNÁMSDEPLINUM

Í Sernámsdeplinum er eitt lærarastarv (møguliga 2) leyst at søkja til setanar **1. august 2003.**

Starvið er fulltíðarstarv.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava
- Fólkaskúlalæraraútbúgving
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt og við hugflogi eftir støðu næminga

Umsøkjari má vilja útinna serskúlaarbeiði í víðastu merking. Eisini má hann vera hugaður at menna stovnsins og sín egna førleika við at luttaka í skeiðum í samráð við leiðslu depilsins.

Í sambandi við møguligar skipanarbroytingar má umsøkjari góðtaka, at umskipan av starvinum kann koma uppá tal.

Læraralesandi, ið taka prógv í summar, kunnu eisini søkja.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum, Fólkaskúladeildini, við starvsstaði í fólkaskúlanum og við fyribils tænastu í Sernámsdeplinum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann, sum sett/settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal verða send **Sernámsdeplinum, á Frælsinum 32, postrúm 2036, FO 165 Argir**, skjótast til ber og soleiðis, at hon er Sernámsdeplinum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 29. apríl 2003.** Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av prógvbrævi og møguligum viðmælum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Hans Eli Dahl, stjóra.

*Tórshavn, 9. apríl 2003*

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 - Postrúm 2036 - FO 165 Argir
Telefon 314522 - Fax 310196 - e-postur: sernamsdepilin@snd.fo


# Útleiguamboð

**Skal tú brúka amboð í styttri tíð? Hví eiga, tá ið tú kann leiga?**

**Til keyps og leigu:**
- Gravimaskinur
- Trumlur
- Lessimaskinur
- Arbeiðsskúrar
- Luft kompressarar og boriútgerð
- Stillads- og forskallingsútgerð
- Umframt mangt annað!



**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 311820


## Farloyvisstarv

# Pedagogur

**til Sambýli í Runavík**

Innan Almannaráðið og stovnar undir tí, við tænastu á sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt farloyvisstarv vegna barnsburð leyst at søkja frá 15 mai 2003 og til 01 januar 2004.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Sambýlið er upprættað til 6 menningartarnað fólk, og uppgávan hjá umsøkjaranum verður sostatt at vegleiða íbúgvarnar í øllum tí, sum tey hava tørv á.
- Tað verður kravt av tær at tú við tíni pedagogisku vitan, kann menna hvønn av teimum sum búgva í sambýlinum, til at húsast saman í felagsskapi hvør við annan, bæði til innanhýsis viðurskiftir og í samfelagnum sum heild.
- At tú saman við íbúgvunum vil skapa trivna og á ein pedagogiskan hátt tryggjar at menningarmøguleikarnir koma í fyrstu røð.
- Somuleiðis er tað av týdningi at tú hevur vilja til at samskifta við okkara avvarðandi og tey, sum vit umgangast dagliga.

Av tí at sambýlið nýliga er upprættað av nýggjum, kunnu vit bjóða tær eitt spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum, bæði persónliga og fakliga.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir + vikuskiftir og heilidagar.

Eru nærri spurningar til starvið, kunnu tit venda tykkum til leiðarin á tlf. 448424 ella 226121
Email: burun@serforsorg.fo
Ert tú áhugað/ur, so send eina umsókn við avriti av prógvum innan 27.04-2003.

Umsóknir skulu stílast til:

**Sambýlið á Rúnarvegi**
Att: Leiðarin
Rúnarvegur 3
Fo - 620 Runavík


# Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og alminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard

# IRAK HJÁLPIN

**Giro 77011**
**ella konto hjá okkum í peningastovnunum**



**REYÐI KROSSUR FØROYA**


LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Skúrar til sølu

Við hesum verða arbeiðsskúrarnir hjá Landsverkfrøðinginum - við brúnna til Vágatunnilin, Leynamegin - lýstir til sølu.

Talan er um níggju skúrar, 2x7 m, sum eru settir saman til skrivstovu- og fundarhøli hjá NCC.

Skúrarnir, sum væntandi verða tiknir niður beint eftir páskir, kunnu til tá síggjast á staðnum í Leynum.

Avheinting av skúrunum, verður eftir nærri avtalu við Landsverkfrøðingin.

Boð skulu verða Landsverkfrøðinginum í hendi seinast 23. apríl 2003, kl. 1400.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Óla M. Petersen, deildarleiðara, tlf. 311333, teldupostur: oli@lv.fo




# HÚS Á TVØROYRI

**( Í VALINUM )**

Um hóskandi boð fæst, eru eini nýumvæld sethús til sølu.

Tlf. 25 55 61

# Sp/f Á-grýtni

**ALT Í:** Timbur
HVS (hita,vatn & sanitet)
Ravmagn



**Ring og hoyr nærri til:**

**Rólant - tlf. 21 16 49**
**ella**
**Ben Gurion - tlf. 50 47 36**
**á kvøldið - tlf. 42 16 49**




# Tøkningur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðar starv sum tøkningur leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 11 fólk á HTM.

Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis

**Talan er um sera fjølbroytt og spennandi starv, ið m.a. fevnir um:**
- meting um tøkniligar loysnir
- fremjing av tøkniligum loysnum
- meting um dygd av hjálpartólum
- skipa fyri umvælingum av hjálpartólum innan- og uttanhýsis
- heimavitjanir saman við terapeutum
- ráðgeving í sambandi við íbúðarbroytingar
- størri tillagingar av hjálpartólum saman við terapeutum
- viðlíkahald av eykalutagoymslu
- fyrisitingarligar uppgávur

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving (maskinmeistari ella aðra tøkniliga útbúgving)
- royndir frá el- ella maskinhandverksvinnu er ein fyrimunur
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- neyðuga eftirútbúgving og upplæring
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara ella Willy Jan Feilberg, tøkning tlf. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 28. apríl 2003 kl. 14.00.


# Eysturoyingar

Nýtt skeið til lastbil og buss byrjar uml. 1. mai í Gøtu.

**Kl / Runavíkar Koyriskúli**
**Tlf. 777777 / 282222**

MBM

# HANDILSTØÐ og SETEPLIR

Vit hava nú fingið stórt úrval av handilstøðum og seteplum á goymslu.
Set teg í samband við eina av deildum/umboðsmonnum okkara, og bílegg í dag.

**Handilstøð:**
Kálksaltpetur 50 kg
NPK til eplir 14-3-18 25 kg
NPK (Kemira) til gras 17-4-13 50 kg

**Seteplir:**

| | |
|---|---|
| Folva | 25 kg |
| Up to date | 25 kg |
| Hanna | 25 kg |
| Maris Piper | 25 kg |
| Oleva | 25 kg |
| Raja | 25 kg |

| | | | |
|---|---|---|---|
| MBM Fóður<br>410 Kollafjørður<br>Tlf. 479035 | MBF Fóður<br>188 Hoyvík<br>Tlf. 479000 | MBM Fóður<br>800 Tvøroyri<br>Tlf. 372454 | MBM Fóður<br>700 Klaksvík<br>Tlf. 457249 |
| P/F Niðri á Møl<br>220 Skálavík<br>Tlf. 361231 | Kirkjuteig<br>210 Sandur<br>Tlf. 361072 | Hjá Peturi<br>360 Sandavágur<br>Tlf. 333320 | |


# Útbjóðing

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður arbeiði í samband við útstykking Vestur í Bø í Fuglafirði boðin út í almennari útbjóðing.

Arbeiðið umfatar, gerð av umleið 240 metrar av útstykking av útstykkingarvegi, við tilhoyrandi kloakk og vatnleiðingararbeiði.

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 14. mai 2003 kl. 11.00, og kunnu teir í boðið hava verða hjástaddir.

útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, tlf. 444006 móti veðhaldi kr. 5.000,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965

Fuglafjørður 09. apríl 2003
**Fuglafjarðar kommuna**
Tekniska deild

# Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Eysturoyar Eystara Bjargingarfelag verður á Brandstøðini í Fuglafirði, mikudagin 23. apríl kl. 20.00.

**Eysturoyar Eystara Bjargingarfelag**
**Tlf. 211138vi**


# Hús í Vági

Hús á Lágabø í Vági til sølu.
Prísuppskot : 450.000 kr

**Tlf. 373874**


# Talilærari

Vit sóknast eftir talilærara til tali-/ málmennandi arbeiði við børnum undir skúlaaldur í Tórshavn. Tann, ið settur verður, fer at samstarva neyvt við royndan talilærara, stovnsleiðarar/- pedagogar og við fakfólk í Sernámsdeplinum.

**Tíðarskeið:** Frá 1. august 2003 til 30. juni 2004.

**Tímatal:** 14 tímar um vikuna

**Førleikakrøv:**
- Fólkaskúlalærari-/pedagogur við talilæraraútbúgving.
  *Audiologopedur við aðrari grundútbúgving og við verkligum royndum við smábørnum er eisini skikkaður.*
- Førleika til bæði sjálvstøðugt arbeiði og til neyvt samstarv við fakbólkar og foreldur.
- Vera hugaður at menna egnan og depilsins førleika á økinum.
- Í samb. v. møguligar bygnaðarbroytingar góðtaka tillagingar eftir hesum.

**Lønartreytir:**
Eftir sáttmála ímillum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið ella sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn** við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi 29. apríl 2003.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Egon Hansen, tali-hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra – Sernámsdepilin tlf. 314522.

*Tórshavn 9. apríl 2003*

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Telefon 314522 – Fax 310196 – e-postur: sernamsdepilin@snd.fo